# Bygdaráðsfundur

**Bygdaráðsfundurin hin 22.03.2010**

Fundarstað: Fundarhøli
Hjástødd vóra: Símin Johannesen
Súni í Hjøllum
Johannus Danielsen
Súnfríð Jacobsen
Elin á Torkildsheyggi
Jákup M. Kjeld
Petur J. Petersen
Alfred Olsen - ref.

**Mál nr. 37/2010 Mentamál.**
J. nr. 2010-0023-0066
Útisetin Erik Olsen, sum er listamaður, og sum er ættaður úr Rituvík, hevur heitt á Nes kommunu, um at eitt av hansara verkum verður sett upp á Nesi. Erik hevur ættarbond á Nesi, og er tað í hesum sambandi at hann hevur sett seg í samband við Nes kommunu.
Skulptururin er gjørdur úr jarnrørurm, við eini rustfríaðri plátu sum er 2,5 metrar til longdar, fóturin er 2,25 metur í diametur.

Mentanarnevndin mælir til, at kanna tilboðið, í samráð við Fornminnisfelagnum, og listarfólki um møguliga plasering o.a.

Á bygdaráðsfundi hin 25.01.2010 var tilmælið frá Mentanarnevndini samtykt.

Mentanarnevndin mælir til, at økið har listarverkið kemur at standa verður í økinum við Neshamar, ( Nes kirkju, Neshamar og gamla prestagarðin).

Avgerð: Bygdaráðið samtykti, at Mentanarnevndin tekur sær av málinum.

**Mál nr. 38/2010 Mentamál.**
J. nr. 2010-0023-0069
Umsøkn um stuðul
Undirritaði, Gerhard Hansen, prestur, sum er í holt við at skriva eina bók um Føroya Barnaheim og mammuna á Barnaheiminum, heitir á kommununa um stuðul til útgávuna, so bókin kann koma út til jóla t.v.s. seinast í november 2010.
Øll sum stuðla bókina fáa eitt eintak ókeypis sendandi. Somuleiðis verður eisini høvi til at keypa bøkur til nettoprís t.d. sum jólagáva til starvsfólk tykkara í virkinum.
Nøvnini á teimum, sum stuðla koma at standa inni í bókini!

Mentanarnevndin mælir til at játta 2.000,00 kr. til bókaútgávuna, sum lýsir søguna av Barnaheiminum, (sum helt til í prestagarðinum á Nesi í tvey ár undir krígnum) ið Nicolina Højgaad, ættað úr Rituvík, setti á stovn.

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini,
upphæddin verður tikin av konto “Ymiskur stuðul”.

Avgerð: Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 39/2010 Umhvørvismál.**
J. nr 2010-0047-0020
Ein dag um árið skipar kommunan fyri einum umhvørvisdegi yvir øll økir í kommunununi og eisini verða plantupakkar til borgararnar

Mentanarnevndin mælir til, at ruddingardagurin verður leygardagin 24. apríl og byrjað verður kl. 10.
Uml. Kl. 12.30 verður hugnaløta á kaiøkinum, har okkurt verður til mætna.
Eisini verður mótasýning frá handlunum í kommununi umframt at sangur eisini verður framførdur.

Fíggjarnevdin tekur undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

Avgerð: Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 40/2010 Vegamál.**
J. nr. 2010-0044-0033
Í skrivi 18.02.2010 verður biðið um, at Nes kommuna ger eitt støðupláss omanfyri húsini við Rætt

Hetta verður gjørt orsakað av, at ferðslan eftir vegnum oman á Rætt er broytt munandi síðan ídnaðarøkið er vaksið.

Tekniska nevnd mælir til, at eigararnir fáa loyvi til at víðkað verandi parkeringspláss, so parkeringin ikki órógvar ferðsluna til økið niðanfyri.

Avgerð: Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 41/2010 Samferðslumál.**
J. nr. 2010-0052-0001
Uppskot til løgtingslóg um undirsjóvartunnil undir Skálafjørð og Tangafjørð er komið til ummælis hjá kommununi.

Tekniska nevnd mælir til at játta P/F Skálafjarðartunlinum byggiloyvi til tunnilin, har portalurin kemur at verða í lendinum vestan fyri Løkin, uttan at fastlagt verður nágreiniliga hvar tunnilsmunnin verður.
Verandi øki er antin lagt út sum hagi ella sum B1 øki, og tí er neyðugt hjá kommununi at gera neyðugar tillaðingar av økinum vestan fyri Løkin, bæði til portalin og vegin, umframt hvat økið sjálvt skal nýtast til.

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd og harafturat mælir Fíggjarnevndin til, at bygdaráðið hevur eina gjøgnumgongd av býarætlanina fyri kommununa.

Avgerð: Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 44/2010 Byggimál.**
J.nr. 2010-0042-0263
Hin 11.02.2010 søkja William Hansen og Høgni W. Høgnesen um loyvi til at byggja seyðhús á matr.nr 80 Nes.

Tekniska nevnd vísir á, at økið sum ætlanin er at byggja seyðhúsið á, er útlagt á býarplaninum sum eitt íbúðarøki til sethús. Hetta viðførir, at byggiloyvi ikki kann gevast til eitt nýtt seyðhús.
Tekniska nevnd vil her vísa á, at her er talan um eitt seyðhús, ið hevur staðið uppi í mong ár, og sum við hesum ætlanum verður endurreist. Tekniska nevnd mælir til at játta byggiloyvi.

Avgerð: Tilmælið frá Teknisku nevnd um at seyðhúsið kann vera endurreist, var einmælt samtykt.

**Mál nr. 45/2010 Loðstænasta.**
J. nr. 2010-0046-0042
Landsstýrið hevur sett sær fyri at áseta loðsskyldu í Føroyum.
Hoyringskriv er komið frá Skipaeftirlitinum.

Nes kommuna hevur, saman við Tofta Havn, gjørt viðmerkingar til uppskotið.

Tekniska nevnd tók hetta sum kunning,

Avgerð: Bygdaráðið tók hetta sum kunning.

**Mál nr. 46/2010 Skúlamál.**
J. nr. 2010-0021-0040
Skúlastýrið heitir á kommununa um at játta pening til at nútímansgera heimasíðuna hjá Tofta skúla.

Fíggjarnevndin mælir til, at málið verður beint í Mentanarnevndina til viðgerðar.

Avgerð: Tilmælið frá Fíggjarnevndini samtykt.

**Mál nr. 48/2010 Stuðulstímar/fíggjarmál.**
Jr. Nr. 2010-0031-0087
Sambart skriv frá leiðaranum á frítíðarskúlanum har søkt verður um stuðulstímar til 2 børn frá august 2010 tá hesi børnini fara í skúla, og harvið eisini í frítíðarskúla.

Trivnaðarnevndin mælir til at játta Frítíðarskúlanum at søkja eftir 2 stuðlum.

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá Trivnaðarnevndina.

Avgerð: Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini samtykt.

**Mál nr. 50/2010 Stuðul til Ítróttarfelag.**
Jr. Nr. 2010-0019-0023
Skriv frá Tofta Ítróttarfelag um fíggjarligan stuðul til avviklan av skuld og kassakreditti.

Eftir fleiri fundir við felagið, mælir fíggjarnevndin til, við ávísum treytum, at verandi lán, sum kommunan veðheldur fyri, verður hækkað við kr.700.000,-

Avgerð: Tilmælið frá fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 51/2010 Byggimál.**
J. nr. 2010-0042-0264
Í umsókn dagfest 19.03.2010 søkir Nes hagi um byggiloyvi til eitt seyðhús, uppi við mylluvegin, einar 40 metrar vestan fyri vegin, við Rákarenda.
Hetta viðførir, at umsóknin skal viðgerðast av nýggjum av Friðingarnevndina fyri Eysturoy og Yvirfriðingarnevndina v.m.

Seyðhúsið sum ætlanin var at byggja niðri við bøgarðarnar úti á Rætt, verður nú flutt niðan móti mylluvegnum, eystanvert við Stovuheygg. Nýggja húsið er 16x8 metur til støddar og sostatt nakað størri enn tað sum byggilovi var til.
Nes hagi hevur sostatt tikið mótmælini til eftirtektar, við at flyta seyðhúsið burtur frá sethúsunum úti á Rætt.

Tekniska nevnd mælir til, at Nes hagi fær byggiloyvi til at gera seyðhús við Stovuheyggj sum er 16x8 metur til støddar ( her fyriliggja øll loyvir til hetta seyðhús, sum er 13x5 m). og byggiloyvi til eitt seyðhús uppi við Mylluvegin við Rákarenda, sum fyrst má vera viðgjørt í Friðingarnevndini fyri Eysturoy áðrenn byggiloyvi verður útskrivað.

Avgerð: Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.